# Ruddingardagurin 2021

## Ruddingardagurin verður leygardagin 29.05.2021

Nýggja koronaútbrotið ger, at ruddingardagurin 2021 verður skipaður eins og undanfarna ár. Dagurin verður skipaður soleiðis at ruddað verður í økjum.

Vit vilja sum kommuna vera við til at birta upp undir at hvør borgari ger sítt til at halda kommununa reina og ruddiliga.

Ruskposar og handskar verða útflýggjaðir á staðnum, har byrjað verður at rudda.

Í samband við ruddingardagin bjóðar kommunan hvørjum húski eitt bokashi-sett, ið er eitt slag av kompostútgerð. Umframt hetta letur kommunan eina plantu til øll tey húski, sum luttaka á ruddingardegnum.

Vit vóna, at tikið verður væl ímóti.

### Skrá fyri ruddingardagin:

Bygdirnar eru býttar upp í somu økir sum í fjør.

Ljósá og Svínáir eru hvør sítt øki við tveimum ymiskum kontaktpersónum.

Eiðis bygd verður býtt upp í 4 ymisk økir við 4 ymiskum kontaktpersónum. Tað er tó upp til hvønn einstakan, um tey velja at skipa seg øðrvísi.



| | |
|---|---|
| **Reytt øki:** Jógvan Olivur Kallsoy<br>Møtast á spæliplássinum við Hvítakletsveg kl.10:00<br>Ætlan: Rudda í økinum og fríðka um á spæliplássinum.<br>Grilla á staðnum kl. 17.00 (franskir hotdog og sunkist frá kommununi). | **Hvítt øki:** Tonny Kruse<br>Møtast á spæliplássinum úti á Bø 62 kl.10:00<br>Ætlan: Rudda í økinum og fríðka um á spæliplássinum.<br>Grilla á staðnum kl. 17.00 (franskir hotdog og sunkist frá kommununi). |
| **Blátt øki:** Rógvi Egilstoft<br>Møtast á Durhuusgrundini við Lækjuvegin kl.10:00<br>Ætlan: Rudda í økinum<br>Grilla á staðnum kl. 17.00 (franskir hotdog og sunkist frá kommununi). | **Gult øki:** Eliesar Olsen<br>Møtast við Hólmahúsið kl.10:00<br>Ætlan: Rudda í økinum<br>Grilla á staðnum kl. 17.00 (franskir hotdog og sunkist frá kommununi). |
| **Ljósá:** Annsy Høghamar<br>Møtast har jólatræið plagar at standa kl.10:00<br>Ætlan: Rudda í økinum<br>Grilla á staðnum kl. 17.00 (franskir hotdog og sunkist frá kommununi). | **Svínáir:** Jens Pauli G. Nolsøe<br>Møtast í teltinum á Svínánesi kl.10:00<br>Ætlan: Rudda í økinum<br>Grilla á staðnum kl. 17.00 (franskir hotdog og sunkist frá kommununi). |

## Plántugáva og bokashi-sett

Kommunan bjóðar hvørjum húski eitt bokashi-sett*, ið er eitt slag av kompostútgerð,



og eina plantu til øll tey húski, sum luttaka á ruddingardegnum. Hetta verður útflýggjað, tá farið verður at grilla.

*Tað eru bert húski, ið hava skrivað seg upp á eidi@eidi.fo til eitt bokashi-sett, ið fáa hetta útflýggjað á degnum. Tey, ið ikki hava skrivað seg upp, men ynskja eitt bokashi-sett, kunnu venda sær til kommununa á eidi@eidi.fo.

**Deil tínar myndir frá ruddingardegnum á Instagram!**

#ruddingardagur2021

#eidiskommuna

#ruddiligastabygd

#ruddaføroyar